# shandskarnar



*Arbeiðsdagar hjá Atlants Kolvetni í Havn. Alt teamið á skrivstovuni í Havn og í London er savnað at hyggja inn í framtíðina.*
*Mynd Jens K Vang*

ar. Tað er so væl útliðið, at tað er ikki rætt at skunda nakað ígjøgnum men rættari er at brúka ta neyðugu orkuna og tíðina at tilrættaleggja eitt seismiskt program til næsta summar heldur. So hetta árið verður brúkt til at leggja til rættis eina rættiliga umfatandi seismiska arbeiðsskrá fyri loyvini á føroyaøkinum næsta ár. Tey bæði feløgini hava eisini neyðugu pengingaligu orkuna til at fara undir slíkt arbeiði.

Krøvini til loyvini í 2. útbjóðing eru, at feløgini skulu brúka tey fyrstu fýra árini til at kanna økið væl og virðiliga við seismikki og síðani taka støðu til boringar. Men eingin sigur, at man skal bíða í fýra ár. Man hevur fýra ár at gera hetta arbeiði í og tess betur tað gongur tess skjótari kanst tú taka avgerð um at bora leggur Wilhelm Petersen aftrat.

## Dyrnar opnar

Atlants Kolvetni fekk tillutað tvey loyvi í 2. útbjóðing saman við Geysirpetroleum, eisini eitt lutvíst lítið felag. Onkur hevur gitt, at Atlants Kolvetni var ov seint á sjóvarfallinum at koma sær við í loyvi saman við størri feløgunum. Hesum hevur stjórin í felagnum fyrr víst aftur. Og hann stendur við hetta. – Sjálvandi vilja vit halda dyrnar opnar fyri, at onnur størri feløg kunnu koma við í okkara loyvi men eg loyvi mær at halda, at vit innan fýra ár, tá vit skulu hava tikið støðu til boring, eru so mikið stórt oljufelag, at vit megna hesa uppgávuna. Sjálvandi vil tað vera best at hava eitt felag við sum hevur borikompetansu, men tað nýtist ikki at vera nøkur fyritreyt.

Wilhelm Petersen váttar, at nú virksemi hjá felagnum fer at økjast, so hyggja tey eftir øðrum og størri hølum í Havnini at hýsa framtíðar virkseminum í. Ein møguleiki er at flyta út í bygningin nærhendis Smyril Line, men eisini aðrir møguleikar verða kannaðir.

Uppá fyrispurning hvør munurin er á teimum báðum føroysku oljufeløgunum sigur Wilhelm Petersen, at tey hava hvør sítt konsept. – Vit í Atlants Kolvetni miðja eftir at forvinna pengar her og nú – ikki bert frá partaeigarunum men frá egnari inntjening. Tað er tann sunnasti vegurin til vøkstur. So hjá Atlants Kolvetni verður tað ein kombinatión av kapitalhækking og egnari inntjening. Tvs. sjálvir at kunna forvinna pengar og ikki bara byggja á vónir.



***Arbeiðsdagarnar í Havn var eisini høvi hjá fólkunum hjá føroyska oljufelagnum Atlants Kolvetni at vitja í nýggja Miðlahúsinum í Vágsbotni***
*Mynd Jens K Vang*

Richard Hardmann oljuráðgevi:

# Basaltbrunnar fara at lata hurðar upp til olju í undirgrundini

**– Eg trúgvi tað er ein framtíð í oljuvinnu í Føroyum. Og tað eru brunnar, sum verða boraðir gjøgnum basaltið, sum skulu lata dyrnar upp til hesa framtíð sigur Richard Hardmann, ráðgevandi jarðfrøðingur hjá føroyska oljufelagnum Atlants Kolvetni. Hann hevur júst luttikið á arbeiðsfundi hjá felagnum í Havn. Sjálvur ivast hann ikki í, at tað verða boraðir brunnar gjøgnum basaltið næsta ár**

OLJUFUNDUR

*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Richard Hardmann vísir á, at oljufundini í bretskum øki, Lochnagar/ Rosebank og møguliga eisini onnur fund so sum Cambo kunnu fáa stóran týdning fyri leiting við Føroyar.

Richard Hardmann telist nevniliga millum teir jarðfrøðingar, sum halda tað vera heilt náttúrligt, at olja finst í føroysku undirgrundini, nú fleiri stór fund eru gjørd beint hinumegin markið. Hóast tað gongur seint, so heldur Richard Hardmann, at tað eru fleiri viðurskifti, sum gagna leiting við Føroyar. Eitt er sannroyndin, at tað er so torført at gera nýggj stór oljufund í heiminum. Tað merkir, at føroyski landgrunnurin hevur eina framtíð. Annað er høgi oljuprísurin. Og tann triði fundini gjørd stutt frá markinum.

Richard Hardmann heldur Atlants Kolvetni vera sera heppið í 2. loyvisrundu. –Felagið hevur fingið tillutað tvey sera góð loyvi, sum strategiskt liggja sera væl fyri. Fara onnur oljufeløg at gera fund í grannalagnum, so verða hesi loyvini bráddliga sera áhugaverd og eg ivist ikki í, at onnur størri oljufeløg fara at banka uppá hjá Atlants Kolvetni sum fráliður.

Hann tekur eisini í egnan barm og vísir á, at tað verður neyðugt at bora nógv fleiri brunnar yvir eitt stórt øki. – Okkara fyrsta boð var skeivt. Tvs. har vit bara fokuseraðu uppá avmarkaða økið í landssynninghorninum av landgrunninum. Nú er at fara longur norður á landgrunnin og bora enn fleiri brunnar har. Neyðugt verður at finna fram til munin millum strukturar, sum hava verið turrir og struktarar, sum hava víst seg at goyma olju og gass. Tað svarið kenna vit enn ikki. Vit hava brúk fyri at hugsa og arbeiða øðrvísi enn higartil.

Tá Richard Hardmann kom til Føroya fyri umleið 10 árum síðani metti hann, at her fór at vera gass heldur enn olja og óheppið. –Eg havi skift meining síðani tá. Finna vit gass, so er tað eisini gott. At onnur oljufeløg umhugsa at útbyggja gassfelt í bretskum øki vestan fyri Hetland ljóðar eisini lovandi fyri eina framtíðar føroyska gassvinnu. Richard Hardmann og starvsfelagar hansara í London eru nú farin aftur til Bretlands at arbeiða víðari við mongu og spennandi uppgávunum hjá tí bretska partinum av Atlants Kolvetni.